## Færri fáa útbúgving

Hóast bæði danska stjórnin og Fólkatingið hava lagt dent á at fáa tey ungu at fáa sær eina útbúgving, vísa nýggj tøl, at tað gongur tann øvugta vegin. Tølini vísa, at í 2000 fingu 83 prosent eina ungdómsútbúgving, men at í 2006 var parturin komin niður á 80 prosent. Í vinnuni siga tey gongdina vera eina gølu, men Bertel Haarder, kenslumálaráðharri, heldur, at tann stóri tørvurin á arbeiðsmegi hevur fingið nógv ung at arbeiða heldur enn at fara í skúla ella í læru.



## Nýggj grønlendsk sálmabók

Fyri fyrstu ferð fær grønlendska fólkakirkjan eina sálmabók, sum fær kongaliga góðkenning frá Margrethu drotning. Nýggja sálmabókin, sum kemur fyri ta gomlu frá 1971, verður tikin í brúk tann 5. oktobur, skrivar Kristeligt Dagblad. Sálmarnir eru heldur fleiri í teirri nýggju bókini, 644 ímóti 560 í teirri gomlu, og allir eru á grønlendskum máli. Sofie Petersen, biskupur, hevur staðið á odda fyri nevndini, sum hevur lagt ta nýggju sálmabókina til rættis.

Ovastevnu. Eyðbjørn við Skipá vann við tíðini5.041, meðan Bergur Joensen kom á má við tíðini 6.312 minuttir.

Fyri áttandu ferð kom regattain, sum Hósvíkar Róðrarfelag skipar fyri, á Nólsoy leygardagin. Teir allarflestu bátarnir av teimum 110, sum høvdu meldað til luttøku, komu við til Nólsoyar. Hetta skapar ein heilt serligan stemning, og er við til at gera Ovastevnuna til nakað út yvir tað vanliga.

Men stevnan varð í sínari tíð byrjað, fyri at savna pening til at byggja svimjihylin, sum Ove hevði lovað børnunum í Nólsoy. Í dag er mann komin til ta niðurstøðu, at tað verður neyvan við egnum pengum, at nakar svimjihylur fæst upp at standa, og tí hevur nevndin fyri nøkrum árum síðani valt, at býta peningin við hini feløgini í bygdini, so tey eisini kunnu hava ein áhuga í at vera við.

Hinvegin heldur formaðurin í Stuðulsnevndini fyri svimjihyl í Nólsoy, Jáup av Skarði, at tíðin er komin til, at ein støða verður tikin til, hvat mann vil við svimjihylinum. Hann sigur, at samband er við Tórshavnar Kommunu um málið, og tað liggur í luftini, at skal nakað henda í málinum, so má kommunan traðka til.

Ovastevnan er komin fyri at verða. Nú er tíðin komin at virða minninum um Ova og fáa bygt nólsoyarbørnum ein svimjihyl, heldur Jákup av Skari.







# Góðu nólsoyingar og góða samkoma

Í 22 ár hevur Nólsoyggin fylgt mær hvønn einasta dag. Eg havi heilsað henni góðan morgun hvønn morgun úr sovikamarsvindeyga mínum, og biðið henni góða nátt hvørt kvøld. Nólsoyggin er tað fyrsta eg síggi, tá ið eg koyri gardinurnar frá, og tað seinasta eg síggi, áðrenn eg fari til songar. Og tað sjáldsama er, at onkursvegna er hon nýggj og endurfødd hvønn dag. Eitt øðrvísi ljós, ein annar himmal, glógvandi mánalýsi tvørturum fjørðin, stundum er oyggin mest sum fjald í mjørka, eina løtu hevur hon hatt og við hvørt er hon hvít. Men altíð liggur Nólsoyggin líka trygg á varðhaldi og verjir fyri Havnina.

Eg havi eisini eygleitt, at sólin næstan altíð skínur í Nólsoy – í øllum førum í Hósmøl. Havnin hevði ikki verið tað hon er í dag – uttan Nólsoynna.

So nær og so kortini so fjarskotin. Tú sært hvørt einstakt hús við einum sterkum kikara, um tú vilt. So nær liggur Nólsoyggin Havnini. Men tá ið tú stígur fótin á land her úti, uml. 20 minuttir eftir at tú fórt umborð á Rituna, so stígur tú inn í ein annan heim. Eitt lítið samfelag, ið tykist so óspilt av øllum tíðarmeldrinum inni í Havnini. Eitt samfelag, har fólk geva sær stundir til at hjúkla um náttúruna, um fuglameingið, og har tónleikurin av álvara er farin at mennast og at trívast. Vit eiga at hjúkla um hetta fjølbroytnið, ið trívist í nærumhvørvinum. Og tað er bæði mín vón og mín kensla, at Havnar Kommuna ger sína skyldu til tess at skapa trivnað og karmar, so at fólkatalið í Nólsoy aftur kemur at vaksa.

Vit sum varða av kommunumálum í landsstýrinum skulu royna okkara besta til tess at røkja okkara skyldur – eitt nú at strekkja kjølin til eina nýggja Ritu sum skjótast.

Tað búgva í dag 257 fólk í Nólsoy, tað eru 90 færri enn í 1966. Men afturgongdin tykist vend. Tað búgva 9 fleiri í Nólsoy í 2008 enn í 2007. Eg ivist ikki í, at um tit nólsoyingar megna at varðveita tykkara serstøku mentan, samstundis sum tit flyta tykkum inn í framtíðina, so verður Nólsoyggin staðið, har tey mongu, sum tá venda aftur til Føroya, vilja sleppa at seta búgv.

Aftur í ár hevur bygdarfólkið tikið stig til at heiðra Ova Joensen, ið framdi tað bragd at rógva tvørturum Atlantshav og til Danmarkar einsamallur í 1986 upp á 41 dagar. Eingin fer helst at gera honum hetta roysnið eftir. Og tí hevur Ove Joensen sett Nólsoynna, Føroyar og tann føroyska bátin á heimskortið fyri eitt bragd, ið ongantíð verður gloymt.

Á Ovastevnu hamskiftist oyggin frá friðarligari bygd – til gyklandi veitsluøki, har fleiri túsund fólk fylkjast. Eg fari at heita á tykkum mongu gestir, at virða Nólsoynna og sýna eins virðiligan atburð, og vóru tit heima hjá tykkum sjávi. Bert á tann hátt ber til hjá nólsoyingum at endurtaka henda góða sið at halda Ovastevnu á hvørjum ári, Ova Joensen sála til heiðurs og æru.

Nólsoyggin hevur fostrað mætar føroyingar. Eg hevði tann heiður í morgun at vera við til at avdúka nýggja standmynd í Klaksvík, ið fyllir 100 ár 1. oktober í ár. Standmyndin myndaði ikki Nólsoyar Páll, men gav høvi til at hugleiða um tað, sum Nólsoyar Páll er komin at ímynda í Føroyum, nevniliga dirvi til at royna nýggjar leiðir og at offra seg fyri einari søk.

Nólsoyar Páll varð føddur í Nólsoy og sleit sínar barnaskógvar her úti. Her man ein frælsis neisti verða kyndur í barmi hansara, og ein ætlan at bøta um viðurskifti teirra, ið eru fyri órætti. Hann strembaði av øllum alvi eftir at vinna føroyingum fríhandil. Tað eydnaðist honum ikki at liva tann dag, fríhandilin at enda kom í 1856. Ein av grundunum til tess var, at føroyingar sjálvir mótmæltu fríhandli í Føroyum, og ynsktu at varðveita skipanina, júst sum hon var.

Vit mugu ikki lata hesa søgu endurtaka seg, at vit sjálvi berjast fyri at varðveita gamlar skipanir, ið forða fyri menning.

Eg eri sannførd um, at tit sum búleikast her úti í Nólsoy langt síðani hava skilt henda boðskapin.

Við hesum orðum fari eg at seta Ovastevnuna, og ynskja tykkum øllum eina góða og virðiliga stevnu, har vinabond verða knýtt og slóðað verður fyri samvinnu og samstarvi millum Nólsoynna og aðrar partar av landinum.

Tað eru menniskju og ikki skipanir, ið skapa samstarv og framburð.



**Góða Ovastevnu**